**Harald Anthoniussen:**

# Fiskimaðurin sum gjørdist trúboðari

**Tað eru fleiri ár síðan, at eg fyrstu ferð hoyrdi um Harald Anthoniussen. Fekk tey ráð frá fleiri um at fara at práta við hann, tí hann var so sera skilagóður. Hetta lá tó ikki so væl fyri, tí Harald búði í Esbjerg, og tað er ikki á hvørjum degi, at ein kemur framvið har. Men í summar lá fyri, og farið varð inn á gólvið hjá Haraldi og konu hansara. Hann setti seg kortini ikki føran fyri at greiða frá. Hinvegin fekk eg frá honum frásagnir, sum hann hevði skrivað um sítt lív til sjós. Hetta var sera áhugaverdur lesnaður. Harald gjørdi nógv burturúr, og hann fekk allar smálutir við. Júst smálutirnir kunnu vera virðismiklir, sum tað líður frá. Men tað var tó heppið, at hendan vitjanin fekst í lag, tí nú er Harald deyður. Konan doyði fyrr í heyst. Hetta var ein slíkur smeitur fyri Harald, at hann kom ikki fyri seg, og mitt í desember doyði hann eisini**


Óli Jacobsen
olij@sosialurin.fo

Harald var ættaður úr Ansastovu í Oyndarfirði. Foreldrini hjá honum vóru Lena (1882-1963) og Dánjal J Anthoniussen (1877-1953). Tey vóru 8 systkin:

Johanna, f. 1910, Harald, f. 1911, Hans Christian, f. 1913, Anna Maria, f. 1915, Sigrid, f. 1918, Jacob, f. 1920, Kristina, f. 1922.

Harald Anthoniussen giftist 10. mai 1941 í Randers við Margrethe Christiane Kristensen, f. 10.1. 1918. Tey búsettust í Esbjerg og fingu tveir synir:

Oyvind, f. í februar 1945, doyði 5 mánaðir gamal.

Beini, f. 2.7. 1947. Kona hansara eitur Rita.

Haraldur var sjómaður, tá hann var ungur, men foreldrini høvdu heldur viljað, at hann var heima og lærdi seg at smíðja hjá pápanum. Honum stóð eisini í boði at taka við festinum í Tarti, men hansara hugur stóð til sjógvin. Í 1928 slapp hann á Eysturlandið við Silver Lining, sum Justines Eidesgaard átti og førdi. Hann var fyrst nøkur ár til til skips.

Veturin 1935/36 var Haraldur niðri á háskúla, kom upp aftur og fór aftur til skips. Hann ætlaði at fara á stýrimansskúla, men fekk ikki sýnsprógv. Hann fór tí niður aftur, var á háskúla og arbeiddi stutta tíð á bóndagarði. Síðan fór hann í andaligt arbeiði sum trúboðari hjá Indre Mission. Hetta kom at vera hansara lívsstarv. Fyrstu tíðina arbeiddi hann í Randers, har hann hittu konu sína. Tey fóru síðan til Esbjerg. Aftaná kríggið búðu tey sjey ár í Føroyum men fóru niður aftur og búðu tey seinastu mongu árini aftur í Esbjerg.

Vit fara í fýra pørtum at hava frásøgn um sjólívið hjá Haraldi, soleiðis sum hann sjálvur hevur greitt frá.

Vit fara eisini at hava okkurt tilfar um Oyndarfjørð í hansara tíð. Harald og 101 ára gamli Andrias í Tarti vóru samtíðarmenn, og teir vóru eisini systkinabørn. Tí fara vit at byrja við at endurgeva nakað av tí, sum Andrias greiddi frá í FF-blaðnum í 2006 um sín barndóm, sum eisini var barndómurin hjá Haraldi.

## Andrias: Fiskaarbeiði á landi

Sum børn arbeiddu vit eisini fisk. Tað kom nógvur saltfiskur uppá land. Tá eg var smádrongur, komu nógvar sluppir og landaðu saltfisk í Oyndarfirði til turkingar. Eg meini, at tað eina árið vóru 1.800 skippund virkað í Oyndarfirði gjøgnum fjøruna. So her var nógv arbeiði, og hetta skuldi verið eitt av teimum frægastu plássunum í Føroyum í so máta. At boða til arbeiðis varð flaggið koyrt upp um 5-6 tíðina um morgunin. So komu tey, sum tað bar til.

Tað vóru fleiri hús, har sum eingin sjómaður var, so tey livdu alt árið av lønini, sum tey fingu. Eg meini, at fyrst eg minnist fekk konufólkið 15 oyru um tíman og mannfólkið 25 oyru. Tey, ið arbeiddu í fiski, fingu lønarseðlar, sum tey fingu vørur fyri í handlinum. Viðhvørt tóku tey fisk fyri akkord. Tey vaskaðu og turkaðu hann inni í Laksá.



*Harald Anthoniussen, tá ið vit hittu hann í summar*

Børnini, sum arbeiddu, fingu lítið og einki. Tey kundu fáa eina søta keks ella eitt kramarhús av bomm. Tað vóru ikki nakrir pengar.

Mamma var bert onkuntíð í fiski. Hon hevði nóg mikið at gera heima. Pápi var sjómaður. Eg kann minnast sum smádrongur, at eg vaknaði ofta av hosta. Man hostaði nógv meira fyrr enn nú, tí man gekk vátur um beinini. Skóbúnaðurin var rotuskógvar og trætuflur. Á vetri máttu vit ofta ganga í krapa, tí bleiv man fuktigur. Eg kann minnast tíðliga á morgni í køkinum. Tá sótu tey, mamma bant, og pápi spann. Tað var nógv at seyma, men mamma hevði tó ikki seymimaskinu frá byrjan av. Eina slíka keypti eg mammu, eftir at eg var farin til skips. Men vit høvdu eina syirsku her, sum var slektað úr Rituvík, hon kallaðist Trina f. Petersen, gift við Sámali á Breyt. Tey vóru barnleys. Hon seymaði fyri fólk. Mangt plaggið seymaði hon, men hon mundi fáa lítið fyri tað. Hon var eisini eitt so deiligt menniskja. Eg minnist, at hon seymaði kepparnar til mannin, sum hann brúkti.

## Harald: Fyrsti túrur til skips

Eg fór til skips í 1928. Eg varð konfirmeraður í 1925, so mótsatt nógvum av mínum vinum slapp eg ikki avstað beinanvegin. Men tað var kortini nóg mikið at gera heima. Pápi var bátasmiður, og honum kundu vit brøður hjálpa, men ein drongur var ikki rættur maður, fyrr enn hann fór til skips!

Hesa tíðina vóru um 50 skipsfiskimenn í Oyndarfirði, og sama tal var av børnum undir 14 ár.

Tá ið skipini komu heim vártúrin 1928, vildi eg sleppa av avstað. Eg bað pápa spyrja teir skiparar, hann kendi, men tað lá einki fyri.

Men í Oyndarfirði var ein skipari við egnum skipi, sum var Silver Lining. Men Justines Eidesgaard vildi ikki hava meira enn ein ella tveir nýbyrjarar við á hvørjum túri.

Eg spurdi so Justines sama dag, sum hann kom heim vártúrin 1928, um eg kundi sleppa við komandi túr. Justines kundi ikki svara fyrr enn um tveir dagar. Hetta vóru tveir spennandi



*Grethe, Beini og Harald Anthoniussen á yngri árum*